# TILTØK

SAMBAND
SIGRID TRÓNDARSON
SIGRID@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

**Gudstænastur**
**Mikudagin 13. september**
***Leirvíkar kirkja:*** kl. 15.30, altarg., Uni Næs. Guðstænasta fyri eldri í samstarvi við Heimarøktina.

**Leirvíkar kirkja**
Í samstarvi við Heimarøktina, verður skipað fyri guðstænastu fyri eldri í Fuglafirði og í Leirvík.
Guðstænastan verður í Leirvíkar kirkju mikudagin 13. september kl. 15.30 við altargongd.
Kirkjan skipar fyri koyring. Tey, ið hava brúk fyri bili, kunnu ringja og siga frá á Vesturstovu tlf. 444714, á Giljagarði tlf. 443800 ella ringja til prestin tlf. 444013.
Aftaná guðstænastuna verður høvi at fáa ein kaffimunn.

**Hóskvøldið 14. sept.**
***Norðoya Vistarheim:*** kl. 19.30 Uni Næs

**14. sunnudag e. trinitatis**
***Vesturkirkjan:*** kl. 11.00 Bergur D. Joensen
***Argja kirkja:*** kl. 11.00, Heri Joensen
***Havnar kirkja:*** kl. 11.00 Erland Beder
***Nólsoy:*** kl. 12.00 Sonja Klein
***Kirkjubøar kirkja:*** kl. 12.15, Heri Joensen
***Sørvágur:*** kl. 11.00, Inga Poulsen Dam
***Sjóvar kirkja:*** kl. 12.00 Ung av Strondum syngja, Jógvan Fríðriksson
***Leirvík:*** kl. 11.00, Uni Næs
***Christianskirkjan:*** kl. 11.00 Lestur
***Klaksvíkar sjúkrahús:*** kl. 10.00,
***Haraldssund:*** kl. 12.00,
***Norðoya Røktarheim:*** kl. 14.30 Niels Pauli Danielsen
***Hov:*** kl. 12.00, Patrick de Neergaard
***Ellisheimið á Tvøroyri:*** kl. 16.00 altarg.,
***Sjúkrahúsið:*** kl. 17.20, altarg., Patrick de Neergaard

**KFUM og KFUK í Havn**
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Lívdin á Brekku 3**
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti, Símun Absalonsen talar.
**Sunnumorgunin í Hoyvíkar skúla**
Kl. 10.30 á Familjumøtinum talar Janus Gunnarson, kl. 11.30 Samfelagsløta.
Á tilbiðjanarmøtinum kl. 12.00 talar Jógvan Z. um »Sannleikar úr Rómbrævinum« (Róm. 8.1). Undir møtinum er barnaansing. Kl. 12.00 Sunnudagsskúlin. Møtini sunnudag kunnu hoyrast á netinum. www.livdin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Mikudagin kl. 6.00 morgunbøn, kl. 17.00 tímabøn, kl. 19.00 Delli
Hósdagin kl. 6.00 morgunbøn, kl. 19.00 Chill
Fríggjadagin kl. 6.00 morgunbøn, kl. 20.00 ungdómsmøti
Leygardagin kl. 14.00 Brúðarvígsla
Sunnudagin kl. 10.45 morgungudstænasta - Sam Jakobsen talar, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 17.00 Samkomufundur.
www.filadelfia.fo

**Aglow, Tórshavn**
Leygarkvøldið kl. 19.30 Møti í Oasuni, Kirkjustræti 4 í Hoyvík. Elisabeth Askham talar og Birgit Nónklett syngur. www.aglow.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Hósdagin kl. 16.00 Eldrahugni.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, kl. 18.00 Evangel. møti, Dánial á Dul Jacobsen talar. www.gospel.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Týsdagin kl. 20.00 Hornvenjing.
Mikudagin kl. 15.00 Bønarmøti.
Hósdagin kl. 20.00 Heimaforbundið - allar kvinnur vælkomnar.
Sunnudagin kl. 11.00 Halgunarmøti, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið v/ Landavegin**
Hóskvøldið kl. 20.0 Møti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli á Norðasta Horni, kl. 18.00 Møti v/ Hans Paula Jacobsen og Ada Gregersen.

**Fríkirkjan Oasan Kirkjustræti 4**
Mikukvøldið kl. 20.00 betaskeið byrjar evni: Orðið, hin fasti grundvøllurin.
Hóskvøldið kl 20.00 ungdómsmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.00 After Eight.
Sunnudagin kl 11.00 Guðstænasta V/Jóna Johannesen kl 14.00 Sunnudagsskúli.
Verið hjartaliga vælkomin.
www.oasan.fo

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20.00 Uppbyggingar- og bønarmøti. Robert McLuckie úr Írlandi talar.
Hósdagin kl. 20.00 Ungdómsmøti. Vegna umbyggingina í Ebenezer verða ungdómsmøtini í Hebron til einaferð í november mánaði.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing, kl. 11.30 Samvera við drekka, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og møti, Súni S. Jacobsen talar.
www.hebron.fo

**Meinigheitshúsið í Havn**
Týskvøldið kl. 20.00 Bibliutími, Matt. 18,21-35.
Mikukvøldið kl. 19.00 Meinigheitskórið venur.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Frants Jensen, evni: Ísrael, Guðs útvalda fólk. Ungdómskórið syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Ebenezer**
Týsdagin kl. 18.55 Sangvenjing, Gospel Hearts - venja í Ebenezer, kl. 20.00 Sangvenjing, Ebenezerkórið - venja í Ebenezer.
Mikudagin kl. 20.00 Bønar- og uppbyggingarmøti - talari: Don Hinchcliff.
Hósdag kl. 20.00 Ungdómsmøti - Møti er í Hebron á Argjum, talari: Jógvan Jacobsen. Fríggjadag kl. 20.00 Teen-Night.
Sunnudag kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
www.ebenezer.fo

**Kollafjarðar Missiónshús**
Bíbiltími verður aftur týskvøldið kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Filadelfia, Miðvágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Undirvísing og bøn.
Hóskvøldið kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar.

**Miðvágs Missiónshús**
Leygardagin kl. 13.00-17.00 Loppumarknaður og tombola.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli og kl. 18.00 Møti v/ Bergur Debes Joensen. Hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Kedron í Sørvági**
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11.00 Uppbyggingarmøti við breyðbróting, kl. 11.30 Sunnudagsskúli - fyri øll børn, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Barnakórið venur mikudag kl. 17.00.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti.
Talarar frá bønarráðsstevnuni.

**Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum**
Mikudagur 13. sept. Bíbiltími kl. 20.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tofta missiónshús**
Týskvøldið kl. 20.00 samlast Sjómanskvinnuringurin. Allar kvinnur eru vælkomnar. Innsavnan til sjómansmissión.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Mikudagin kl. 20.00 Bønarmøti
Sunnudagin kl. 10,30 Møti. Øll hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Awake við Hjørdis H. Petersen.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Paula Høj, evni: Trúgv. Barnamøti kl. 17.00. Vælkomin í kelduna.
www.keldan.fo

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa mikukvøldið kl. 19.30. Ragnar Niclasen greiðir frá og talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, á Brekku 19, Klaksvík**
Týsdagin kl. 19.30 Bíbliutími.
Mikudagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Fríggjadagin kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 10.00 Morgunbøn.
Sunnudagin kl. 14.00 Møti við sunnudagsskúla. Fríðbjørg Michaelsen talar. Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 Morgunmøti.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið k. 20.00 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti v/ Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.

**KFUM og KFUK, Klaksvík**
Týskvøldið kl. 21.30 Bønarløta.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bibliutími við Kristian Fríðrik Olsen, evni: 2. Kor. 2. kap.
Hóskvøldið kl. 19.00 Bønarløta.
Fríggjakvøldið kl. 22.00 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18.00 Møti við Kristian Fríðrik Olsen, kl. 21.00 Ungdómsmøti. Øll vælkomin. www.kuff.fo

**Missiónshúsið í Skopun**
Mikudagin kl. 20.00 Bíbliutími 2. Tess. 3. kap.

**Betania, Skopun**
Bønarmøti verður í kvøld kl. 20.00.
Mikukvøldið kl. 20.00 Bønarmøti.
Hóskvøldið kl. 20.00 Bønarmøti. Aftaná møti venur kórið.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Mikukvøldið kl. 20.00 Heimaforbundið. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Hóskvøldið kl. 20.00 Bønarløta.
Sunnudagin kl. 11.00 Halgunarmøti, Karina Magnussen talar. Kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18.00 Evangel. møti, loytnantur Ragnar Ludvig talar.
Mánadagin kl. 7.00 Morgunbøn. Øll eru vælkomin í Frelsunarherin.

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Ætlanin er at fara túr til Suðuroyar leygardagin 23. sept. kl. 10 av Havnini og heim aftur av Tvøroyri sunnudagin 24. sept. kl.17.30. Leygardagin verður farið í Hvannhaga og sunnudagin gongutúr úr Trongisvági til Fámjins (umleið 3 tímar).
Tilmelding (við depositum á kr. 200,- at seta í Norðoya Sparikassa, Leirvík konta nr. 9865-1033381) á Kunningarstovunum tlf. 449449 (417060) og 444860 áðrenn fríggjadagin 15. sept. Kl.14.

**Føroyingafelagið í Odense**
Pisuveitsla verður leygardagin 16. september kl. 19.00 í Musikhuset, Rasmus Rask Kollegiet, Elmelundsvej 4, 5200 Odense V.
Tilmelding áðrenn 15. september á tlf. 2683 8207 Jónbjørg ella 2846 5625 Jórun.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag-fríggjadag kl. 10.00-17.00
Teldup.: tilhald@tilhald.fo
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
***Mánadagin 11. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14.00-17.00 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
***Týsdagin 12. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-11.30 Vit syngja, Johann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15.00 **Hvørji tilboð hevur FK til smá húsarhald?** Sigrid D. Dalsgaard, húshaldslærari
***Mikudagin 13. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-12.00 Vælgerandi handverksætlan á loftinum
Kl. 15.00 Túrur við ella uttan stavar, úr Tilhaldinum yvir Strond og heim eftir Hoyvíksvegnum
***Hósdagin 14. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen
kl. 10.00-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00 »Lesibólkur«.
kl. 14.00-16.00 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen
***Fríggjadagin 15. september***
kl. 9.00-16.00 Skeið í horn og træhandverki, Thue Christiansen

**Brúdleyp**
Leygardagin 16. september kl. 14.00 giftast í Glyvra kirkju Erla á Torkilsheyggi, Nes og John Dávur S. Djurhuus, Saltangará. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

***Hey, vit skulu giftast!***
Leygardagin 16. september kl. 13.00 giftast í Bíggjar kirkju Annika Niclasen og Bjarni Niclasen. Døgurði er fyri innbodnum í Missiónshúsinum Libanon í Sørvági kl. 16.00. Kl. 20.00 er Opið hús í Missiónshúsinum og øll eru vælkomin.



Leygardagin 16. september kl. 14.00 giftast í Filadelfia í Havn Karin Rasmussen og Ragnar Háskor. Reseptión verður eftir vígsluna. Øll eru vælkomin. Brúdleypið verður fyri innboðin á Hotel Føroyum kl. 19.00.

Leygardagin 14. oktober kl. 15.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Hjørdis Sivertsen, Norðdepli og Brian Hansen, Kalundborg. Vælkomst verður kl. 21.00 á Hotel Norð. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, kunnu siga frá á tlf. 452129 ella 211029 seinast 1. oktober.

Tann 28. oktober kl. 14.00 giftast Jórun Kjærbo og Jens Bogi Josenius í Højnæskirken, Højnæsvej 60, 2610 Rødovre. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma til veitsluna um kvøldið, verða biðin um at siga frá á tlf. 316519 ella á tlf. +45 43424484 áðrenn tann 7. oktober 2006.

**75 ára føðingardagur**
Tann 6. oktober verður Steingrím Samuelsen, Sevmýri, 75 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 7. oktober á Gistingarhúsinum í Øravík kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða Steingrím við at koma, verða biðin at siga frá áðrenn 1. oktober á tlf. 371166.

**80 ára føðingardagur**
Í dag, 12. september verður Maria Jacobsen, á Sýnini, Glyvrum 80 ár. Dagurin verður hildin í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum leygardagin 16. september kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

**85 ára føðingardagur**
Í dag, 12. september verður Petur Adrian Jacobsen, Leirvík, 85 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 2. oktober kunnu Dagmar og Tommy, Klaksvík, halda silvurbrúdleyp. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum kunnu siga frá á tlf. 456405 ella 584175 í seinasta lagi 20. september. Veitslan verður í Skálanum kl. 18.00.